Úr botninum

Útisetar okkara stríddust væl í vikuskiftinum og bjargaðu sær úr botinum nú bert tvey umfør resta í

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Undan dystinum ímóti Hillerød lógu føroyingar í Keypmannahavn á fimta plássi í 2. deild og bert trý stig og tvey pláss niður til niðurflytingarplássi. Hillerød lógu hálvt stig aftari enn føroyska felagið, og tí varð talan um týðandi botndyst.

Ikki vóru útlitini góð hjá okkara monnum, tá Heini Olsen, Flóvin Tór Næs og Rógvi W. Rasmussen ikki vórðu tøkir til hendan dyst. Gamla orðavendingin sigur tað væl, nevnliga, at maður kemur í mans stað, og tíbetur varð júst hetta prógvað í dystinum, sum endaði við einum 4,5 — 3,5 sigri til føroyingarnir.

IM John Rødgaard bleiv boðin niður at manna plássið hjá Heina, meðan Terji Petersen og Magnus Egholm arvaðu plássini hjá Flóvin og Rógva. Tá rating viðvíkur vóru danirnir við yvirlutan, men stigini fóru kortini rætta vegin.

John Arni Nilssen telvaði eitt gott talv á fyrsta borði og vann. Nevnast skal tó at danin, Jens Østergaard, hevði gyltan møguleika tað einu løtuna at avgera talvið, men sá tíbetur ikki ljósið.

Merkisvert ljóðar tað, men allir hinir sjey telvarnir á liðnum leiktu javnt. Bert eitt vunnið talv og heili sjey javnleikir. Sera óvanligt. Bert tveir av hesum sjey javnleikum vórðu lidnir innan fjórða tíman, nevnliga teir hjá IM John Rødgaard og Carl Eli N. Samuelsen.

Eyðun Nolsøe, Magnus Egholm og íslendarin á liðnum, Hlídar Hreinsson, bardist væl og leingi fyri javnleikinum, meðan Heini Danielsen helst átti at fingið alt stigið, men bleiv snýttur og mátti taka til takkar við hálvum gekki. Terji Petersen sat seinast eftir og vann sær javnleikin.

Støðan í 2. deild

K41	26,5
Helsingør	22
Føroyar	20,5
Skakspilleren	20,0
Hillerød	19,0
AS 1904	18,5
Fredriksberg	17,5
Lyngby-Virum	16,0

Sum tað sæst á stigartalvini eru føroyingar nú á einum heiðurligum triðja plássi, men eru enn bert trý stig frá niðurflytingarplássinum, eftirsum tvey lið flyta úr deildini. Munurin er tó at liðið hevur yvirhálað tvey onnur lið, sum hava tungar dystir eftir. Eitt lið flytur upp í fremstu deildina, og sum tað sæst, er hetta nærum við vissu ein ógjørlig uppgáva hjá føroyingunum. Tvey umfør resta í, og næsta mótstøðulið føroyinga verður AS 1904 (verður telvað 24. feb). Í seinasta umfari verður toppliðið K41 mótstøðuliðið (seinasta umfar 17. mars), sum hava verið suvirenir í ár og flyta allarhelst upp í 1. deild.

Ungdómskappingin útsett

Vegna harðan storm um vikuskifti, varð ungdómskappingin á Oyrarbakka útsett. Helst verður kappingin flutt til leygardagin 17. februar, men enn kann einki sigast við vissu. Sí www.faroechess.com um nærri upplýsing.

Heili 150 børn høvdu teknað seg, og er hetta óhoyrt høgt tal og sjálvsagt sera gleðiligt. Seinasta árið hevur talv sum ítrív vaksið alsamt millum skúlabørn, og eiga feløgini kring landið heiðurin fyri hetta. Talvsambandið eigur eisini sín lut í hesum tiltøkum. Eitt nú verður meira figgjarlig orka frá TSF løgd í ungdómstelving kring landið, og hetta samanspæl millum feløgini og TSF tykist at bera frukt.

Um tit hava spurningar viðvíkjandi komandi kapping á Oyrarbakka, setið tykkum í samband við Bergur Johannesen á tlf. 210056, ella teldupost: berglis@post.olivant.fo.

NM fyri unglingar

Í døgunum 14-17. februar verður Norðurlandameistaraheitið fyri unglingar leikt í Danmark. Úr Føroyum fara Martin Poulsen, Hans Kristian Simonsen (17-20 ára bólkurin), Olaf Berg, Rani Thómasson (15-16 ár) og Rógvi Mortensen (11-12 ár). Liðleiðari verður John Rødgaard. Trý kend nøvn eru millum hesar ungu sterku telvarar, nevnliga Martin, Hans Kristian og Olaf, meðan tvey nýggj andlit í NM høpi eru teir báðir, Rani og Rógvi.

Rani er klaksvíkingur og har norðuri frá verður sagt, at hann er sera talentfullur, og ein framtíðar elitutelvari. Eitt nú prógvaði Rani sítt virði tá hann leikti javnt móti tí meira kenda Hans Kristian í FM-Unglingakappingini seinastu páskir, umframt at Rani eisini koppaði The Grand Old Man Justines Hansen av Toftum - sum er umleið 60 ár eldri enn Rani — í liðkappingini.

Rógvi er evnaríkur havnardrongur, sum hevði eitt rimmar 2001 talvár við eitt nú góðum úrsliti seinastu páskir, umframt eina sera góða Íslandssúlukapping og HT-open. Bæði Rani og Rógvi eru sera ágrýtnir og luttaka í nógvum kappingum. Jú, framtíðin innan føroyska telving tykist bjørt.

Sum liður í komandi NM-kapping, er serligur talvskúli nú á døgum í Klaksvík, har Heini Olsen undirvísur okkara ungdómselitutelvarum, umframt at aðrir áhugaðir ungdómar eisini eru við í tiltakinum.

So verður kappast

TÍÐINDASKRIV
Talvfelagið Rókur:

"Vit hava gjørt av, at skipa fyri útsettu ungdómskappingini á sama stað, Ungmannafelagshúsinum Eydnuni á Oyrarbakka, Leygardagin 16. februar klokkan 11.30.

Øll liðini sum teknaðu seg til kappingina 2. februar, sum bleiv útsett vegna veður, eru sjálvsagt eisini teknaði til kappingina 16. feb. Best er tó um øll lið bæði úr skúlum og talvfeløgum tekna til av nýggjum áðrenn týsdagin 12.februar 2002.

Møguleiki er enn hjá øðrum áhugaðum at tekna seg á tlf. 210056, ella teldupost: berglis@post.olivant.fo

Máltindarnir

Kvinnur:			
Asta Petrauskiene	Sóljan	145	(22)
Simona Dziugyte	Stjørnan	133	(38)
Lotte Sørensen	Kyndil	117	(52)
Gabriella Fekete	VB	104	(26)
Ioana Rápa	VÍF	97	(23)
Regina Radó	VB	86	(21)
Annika Ljósstein	Kyndil	83	(14)
Joan M. Joensen	Stjørnan	78	(2)
Ileana Manulescu	StÍF	76	(12)
Katrin á Neystabø	Neistin	76	(35)
Anna K. Samson	Stjørnan	66	(1)
Andrijana Milodanovic	Stjørnan	66	(9)
Sóley Mikkelsen	VÍF	64	(12)
Birita Wardum	Neistin	62	(10)
Nicoleta Radu	VÍF	58	(1)
Menn:			
Bjarni Wardum	H71	110	(27)
Jacob Jónsson	Neistin	106	(15)
Heini Joensen	Neistin	104	(32)
Høgni Klein	Kyndil	98	(7)
Dragisa Stojovic	Tjaldur	96	
Costin Dumitrescu	StÍF	95	(28)
Ingi Olsen	VÍF	91	(11)
Finnur Hansson	H71	89	(21)
Halgir Dahl Olesen	H71	87	(11)
Sverri Justinussen	Tjaldur	86	(13)
Sámal Joensen	VÍF	86	(13)
Durica Tomic	KÍF	83	(22)
Iljan Topic	KÍF	82	
Artur Johansen	StÍF	73	(5)
Mortan Hansen	Tjaldur	73	(7)

Hondbóltsstøður

1. Deild kvinnur

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	VÍF	3	3 - 0 - 0	443	265	178	18
2	Stjørnan	3	3 - 0 - 0	401	313	88	15
3	VB	4	3 - 1 - 0	377	380	-3	13
4	Neistin	4	1 - 1 - 2	344	312	32	11
5	Sóljan	5	1 - 0 - 4	314	468	-154	4
6	Kyndil	4	0 - 0 - 4	366	425	-59	3
7	StÍF	3	1 - 0 - 2	269	351	-82	3

1. Deild menn

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	VÍF	4	4 - 0 - 0	470	386	84	19
2	Neistin	4	3 - 0 - 1	494	415	79	16
3	StÍF	3	2 - 0 - 1	415	402	13	10
4	Tjaldur	5	2 - 0 - 3	423	478	-55	8
5	H71	4	0 - 1 - 3	438	466	-28	7
6	Kyndil	4	2 - 1 - 1	372	417	-45	7
7	KÍF	4	0 - 0 - 4	415	463	-48	4

UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

Finnland fær matvøruhjálp

Hóast Finnland verður roknað sum eitt av teimum ríku londunum í heimninum, fær landið matvøruhjálp frá ES, har landið er limur. Hjálpin kom í gildi, tá finski búskapurin var í álvarssamari kreppu fyrst í 1990-árunum, og hóast viðurskiftini eru nógv broytt til tað betra síðani, heldur skipanin fram.

Nógvir finnlendingar eru ímóti, at stjórnin skal taka av hjálpini. Víst verður á, at finska vinnulívið við flaggskipinum Nokia á odda gongur sera væl, og at talið á millióningum í Finnlandi veksur á hvørjum ári. Fyri tveimum árum síðani segði stjórnin, at hon fór at biðja ES steðga skipanini, men enn er tað ikki gjørt. Tísakil fær Finnland eisini matvøruhjálp frá ES í ár

SAS sigur nei

SAS sýtir fyri at lækka prísin á innanlandsflúgvingini í Noregi. Serliga tey, sum búgva í Norðurnoregi, hava fýlst á, at tað er alt ov dýrt at flúgva úr Oslo og norðureftir. Kanningar hava eisini víst, at norðmenn, sum skulu úr Oslo til Bodø, rinda 24 prosent meiri enn sviar, sum flúgva úr Stockholm til Kiruna.

SAS ásannar hendan munin, men sigur, at á øðrum rutum er tað helst bíligari at flúgva í Noregi enn í Svoríki. Haraftur vísir SAS á, at lønarlagið í Svoríki er lægri enn tað norska.

Tann 12. februar fer SAS at almannakunngera roknskapin fyri 2001, og longu nú er greitt, at hann fer at vísa einar tvær milliardir krónur í halli. Leiðslan í SAS vil tó ikki siga, at tað er ov bíligt at ferðast, men sigur, at felagið missir 20 milliónir krónur um dagin nú.

Enron-stjóri sýtti fyri at vitna

Kenneth Lay skuldi vitna í amerikansku Kongressini í gjár, men sýtti fyri at koma

ENRON-GØLAN
Árni Joensen

Enron-stjórin Kenneth Lay. Nógv bendir á, at sambandið millum Enron og stjórnina hjá Bush hevur verið í so gott

Mynd: Reuters

Tað var sakførarin hjá Enron-stjóranum, sum kunnaði Kongressina um, at Kenneth Lay fór ikki at koma til avhoyringar. Sakførarin vísti á, at fleiri kongresslimir seinastu dagarnar hava sagt, at Kenneth Lay hevði havt ein sera týðandi og kanska eisini ólógligan lut í, at tann risastóra fyritøkan fór av knóranum.

Sakførarin, Earl Silbert, legði afturat, at tá kongresslimirnir longu hava tikið støðu í málinum, helt hann tað vera skeivt av stjóranum at lata seg avhoyra.

Umboðsmannatingið hevur biðið Kenneth Lay koma til avhoyringar har í dag, men tað er ivasamt, um hann fer.

Tað er komið fram seinastu dagarnar, at sambandið millum Enron-leiðsluna og stjórnina hjá Bush forseta hevur verið gott og kanska meiri enn gott. Kanningar hava avdúkað, at fleiri embætisfólk í umsitingini hjá Bush eru sett í starv eftir tilmæli frá Enron, og at umboð fyri Enron vóru seks ferðir á fundi við Dick Cheney, varaforseta, tá stjórnin skuldi leggja sín orkupolitikk til rættis.

Ríkisgrannskoðanin hevur nú kravt at fáa fundarfrágreiðingarnar frá teimum seks fundunum.

Rændu strandað skip

Fleiri hundrað fólk rændu sunnudagin við av einum russiskum farmaskipi, sum er farið á land í útsynningsonglandi

BRETLAND
Árni Joensen

Russiska farmaskipið "Kodina", sum er skrásett á Malta, sigldi á ein flúr tætt við strondina í Cornwall leygardagin. Sekstan mans vóru við skipinum, og tað eydnaðist bretskum tyrlum at bjarga allari manningini.

Skipið var fermt við viði, og sunnudagin rak nógvur viður upp á land á leiðini, har sum skipið stendur. Bretska løgreglan sigur, at sjáldsama nógvir rekamenn vóru at síggja í Cornwall sunnudagin. Summi komu við smáum lastbilum, sum tey fyltu við viði, og onnur tóku tað, sum tey fingu inn í teir vanligu persónbilarnar.

Løgreglan sigur, at í veruleikanum var hetta ein gamal siður, sum brádliga varð tikin uppaftur, tí tað at leita eftir reka er gamalt í Cornwall. Tað er kent, at fólkið her á leiðini plagdi at villleiða skip fyri at fáa tey at sigla á land, so tey kundu fáa hendur á farminum.

Í dag sigur lógin, at fólk skulu varskógva myndugleikarnar, finna tey okkurt í fjøruni.

Bretsku myndugleikarnir stúra tó meiri fyri oljuni, sum er í tangunum á russiska skipinum, og sum kann elva til stóra dálking. Hildið verður, at skipið hevði okkurt um 500 tons av olju, tá tað fór á flúrin, men í gjár var einki, sum bendi á, at hol var komið á skipið.

Úr Norðurlondum:

Fleiri arbeiðsskaðar

Talið á arbeiðsskaðum í Danmark veksur skjótt. Fyri tíggju árum síðani vísti ein kanning, at 25. hvør dani, sum arbeiddi, fekk skaða á arbeiðsplássinum, men ein nýggj kanning avdúkar, at nú fær 18. hvør dani arbeiðsskaða. Kanningin vísir eisini, at tað er serliga kvinnurnar, sum verða raktar av arbeiðsskaðum, men tað kemst av, at í dag eru munandi fleiri kvinnur á arbeiðsmarknaðinum.

Danska arbeiðsgevarafelagið sigur, at fimm prosent av fráverudøgunum á fyritøkunum standast av arbeiðsskaðum frá medarbeiðarunum.

Ferðsluskaðar dýrir

Norsku tryggingarfeløgini hava roknað út,. at ferðsluskaðarnir kostaðu norska samfelagnum 27,2 milliardir norskar krónur í 2000.

Meginparturin av kostnaðinum er roknaður eftir skaða, sum fólk fingu í ferðsluni. Her verður hugt eftir missinum hjá tí einstaka og hansara avvarandi. Afturat hesum koma so útreiðslurnar av viðgerð á sjúkrahúsi og seinast tann materielli skaðin, sum var tann minni parturin.

Meiri góðs

Góðsflutningurin um Stórabelti í Danmark er vaksin munandi, síðani fasta sambandið kom. Í 1998 fluttu ferjurnar 1215 lastbilar í meðal um dagin yvir um sundið, men síðani brúgvin kom, hevur talið ligið um 2600.

Sambært brúgvarfelagnum hava fleiri danskar fyritøkur umskipað bæði framleiðslu og flutning, síðani fasta sambandið kom um Stórabelti. Talan er sostatt um ferðslu, sum ikki hevði verið, sigldu ferjurnar enn, sigur brúgvarfelagið.